# Kaggin smakkar gull

**Sluttspurturin í billardkappingini fyri lið er nú farin í gongd, og Kaggin liggur best fyri undan teimum seinastu dystunum**

BILLARD

Um vikuskifitið hava oddaliðini hjá Havnar Klubba og Kagganum spælt.

Kaggin vann sera tepurt við 10 stigum móti 8 eftir eina sera spennandi og javna kapping, har verandi føroyameistarin Hendrik Petersen skoraði ein av sínum bestu dystum, omanfyri 1000 eygu.

Men hesin stórdystur var ikki nóg mikið til at fáa sigur heim til Klubban hesa ferðina.

Hetta góða spælið hjá stórmeistaranum kom tó ikki til sjóndar í tí seinasta dystinum í kappingini móti Steinbjørn í Dali, sum sera óvæntað vann á Hendriki og legði harvið Kaggan framum við 10 stigum móti 8.

Hetta úrslitið ger, at Kaggin nú er sett tætt at sínum fyrsta føroyameistaraheiti í mong ár. Støðan undan tí seinasta umfarinum um eina viku er tann, at Kaggin er á odda við 38 stigum, Havnar Klubbi og Klaksvíkar Billardfelag hava 26 stig hvør. Tó hava klaksvíkingar spælt eitt umfar minni enn Klubbin.

**Skal nógv til at koppa Kagganum**

Komandi vikuskiftið verður so avgjørt, hvør verður føroyameistari í billard fyri lið í 2006. Kaggin, sum hevur vunnið øll síni umfør í ár, skal í eldin móti Klaksvíkar Klubba, sum liggur 12 stig aftanfyri. Skulu klaksvíkingar hava møguleika at gerast føroyameistarar mugu teir vinna 16-2 á Kagganum, og tað er lítið sannlíkt.

Á 1. deildarliðnum hjá Kagganum í ár, sum eftir øllum at døma stevnir móti gullinum, eru Bjarni Skaalum, Steinbjørn í Dali og Jan Müller.

Klaksvíkar Billardfelag og Havnar Klubba hava annars spælt móti hvørjum øðrum seinastu vikurnar. Har hendi tað, at klaksvíkingar vunnu annað umfarið 10-8, meðan Havnar Klubbi vann hitt umfarið 10-8, so her vóru stigini býtt javnt, sum so aftur kemur Kagganum til góða.

# EB/Streymur í tryggum hondum

**Tryggingarfelagið Føroyar heldur fram sum høvuðsstuðul hjá EB/Streymi. Partarnir fara nú undir triðja árið sum par**

STUÐULSAVTALA

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið skrivaðu Tryggingarfelagið Føroyar og EB/Streymur undan eina stuðulsavtalu, sum er galdandi fyri kappingarárið 2006. Hetta er triðja árið á rað, at partarnir samstarva á hendan hátt.

EB/Streymur hevur seinnu árini verið millum tey frísku og spennandi liðini í føroysku fótbóltskappingini, og málið er framvegis at vinna fram millum tey fremstu í Formuladeildini.

– Tað hevur nógv at siga fyri okkum, at vit hava ein góðan høvuðsstuðul, tí í dag skal nógv til, um tú ætlar tær at berjast við tey bestu. Og tað ætla vit, sigur Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi.

– At etablera seg í fremstu deildini krevur sítt, men nú royna vit at stevna móti hægri málum. Vit hava í ár sett okkum fyri at koma fram millum trý tey fremstu.




*Jónsvein Simonsen, deildarstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, og Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, fegnast báðir um, at samstarvið millum partarnar heldur fram í 2006*

**Hugaligt at stuðla**

Avtalan, sum nú er undirskrivað, er við smávegis broytingum tann sama, sum hon var frammanundan, og Tryggingarfelagið Føroyar sær fram til enn eitt ár við góðum samstarvi við liðið í Sundalagnum.

– Tey framstig, vit hava sæð í EB/Streymi seinnu árini, gera tað sera hugaligt at halda fram sum høvuðsstuðul, tí felagið arbeiðir sera miðvíst og seriøst. Tað er nakað, ið hóvar okkum væl, sigur Jónsvein Simonsen, deildarstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

– Vit síggja møguleikar í liðnum, sum trygt og spakuliga hevur otað seg longur fram á stigatalvuni, og tá avrikini tala fyri seg, hava vit eisini eina størri kenslu av, at okkara stuðul kann gera mun.

Hann sigur seg vóna, at framhaldandi stuðulssamstarvið kann geva EB/Streymi møguleika fyri at røkka enn longur fram á leið, og hann vísir á, at gongdin hesi seinnu árini hevur víst, at felagið ger støðug framstig.

– Samstarvið við EB/Streym higartil hevur víst, at felagið til fulnar hevur livað upp til tær vónir, vit gjørdu okkum frammanundan, so tí er hetta ein góð avtala og eitt gott samstarv fyri báðar partar, sigur Jónsvein Simonsen.

**Stórt sæð sama fólkið**

Sundalagsmenn eru eisini fegnir um stuðulin, og teir síggja sponsoravtaluna sum ein týðandi part av teimum framtíðarætlanum, EB/Streymur hevur.

– Um vit bara taka hetta komandi kappingarárið, so eru vit her norðuri sera spent, tí vit halda okkum hava eitt gott lið til kappingina. Her er stórt sæð sama fólkið, so tað er ein støðugur hópur, ið enn eina ferð skal staðfesta EB/Streym á fótbóltsliga føroyakortinum, sigur Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi.

– Vit hava eisini tey seinnu árini fingið glett okkum um, at vit hava ment ungar og góðar spælarar, ið megna at spæla seg til pláss á liðnum. Hesir eru nú mentir og hava fingið góðar royndir, so við fólki stendur bara væl til hjá okkum.

Í fjør megnaði EB/Streymur at geva mongum av oddaliðunum ein skarpan gang, og eitt skifti í kappingini vóru sundalagsmenn við heilt har frammi. Við kappingarenda lógu teir í miðjuni, eitt sindur aftan fyri oddaliðini og langt framman fyri botnliðini.

– Stuðulsavtalan við Tryggingarfelagið Føroyar ger tað nógv lættari hjá okkum at arbeiða. Hon hevur nógv at siga fyri felagið, tí við henni hava vit nakrar møguleikar, vit annars ikki høvdu havt, sigur Rólant Højsted.

# Start hevur mist fimm landsliðsspælarar

**Start hevði eitt skifti seks landsliðsspælarar á sínum liði, men nú er bert ein tikin út til norska landsliðið**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað gekk so væl hjá Start og teirra spælarum eitt skifti í fjør, at norski landsliðsvenjarin hevur seks Startspælarar við í bruttohópinum til norska landsliðið.

Men nú er støðan ein heilt onnur, tí Aage Hareide hevur nú bara tikið ein spælara hjá Start við í sínari seinastu úttøku.

Høvuðsorsøkin til hetta er, at stuðulsspælarar hjá Start eru skaddir, og tí kunnu Kristofer Hæstad, Marius Johnsen, Fredrik Strømstad og Atle Roar Håland ikki bjóða seg fram. Harafturat er Alex Valenica vrakur, og Steinar Pedersen, sum hevur snoddað til landsliðið einaferð, er heldur ikki tikin við.

Einasti liðfelagin hjá Toda Jónsson, sum er tikin út til norska landsliðið, er verjuspælarin Bård Borgersen.

## Byrial í Cadiz

Superligafelagið AC Horsens er í hesum døgum á venjingarlegu í Cadiz í Spania. Horsens hevur vant dúliga í kalda og vánaliga veðrinum í Danmark seinastu vikurnar, og nú skal formurin finpussast í lýggjari veðri í suðureuropa.

Ítróttarstjórin sigur við heimasíðuna hjá AC Horsens, at liðið fær nógv burtur úr venjingarleguni. Vøllirnir eru góðir at spæla á, og veðrið er gott.

Fríggjadagin spælir AC Horsens venjingardyst ímóti pólska liðnum Legia Warszawa.

## Spáka til venjing

Føroyska fótbóltslandsliðið er nú komið til Florida, har liðið verður á venjingarlegu næstu 10 dagarnir. Veðrið er av tí besta í sunnara parti av USA, og fyrstu dagarnar hava tað verið upp í 28 hitastig. Tíbetur hava tað eisini verið løtur, har tað hevur verið skýggjað í veðrinum.

Føroyska landsliðið heldur til Fort Lauderdale, og tað er í øllum førum stuttur teinur frá gistingarhúsinum og til venjingarvøllin. Vøllurin liggur beint við hotellið, og spælararnir skulu bara spáka teir 50 metrarnar yvir á vøllin.

Føroyska landsliðið skal venja og spæla dystir á venjingarleguni, sum varðar til 2. mars.

## Lítlar broytingar í nevndum

Á aðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum var nevndarval á skránni, og har vóru ikki nógvar broytingar. Í nevndini fyri FSF var ein broyting. Bjarki Mohr stillaði ikki uppaftur, og í hansara stað kom Høgni í Stórustovu. Rúni Heinesen og Magnus á Stongum vóru eisini afturvaldir uttan atkvøðugreiðslu. Varalimirnir Per Hansen og Mortan Poulsen halda eisini fram.

Dánjal Andreasen og Høgni Høgnesen stóðu fyri vali í dómsnevndini, og teir vóru báðir afturvaldir uttan atkvøðugreiðslu. Varalimir í hesari nevnd verða framhaldandi Hjalmar Joensen og Jónfinn Thomsen. Eisini teir vórðu valdir uttan atkvøðugreiðslu.